John Johannessen:

# Landsstýrismaðurin kann elva til rasismu

**– Bæði tingið og samgongan eru samd um, at framferðarhátturin hjá Jógvani við Keldu í útlendingamálinum als ikki er nøktandi, og eftir mínum tykki skal Jógvan við Keldu ansa eftir, at hann ikki setur niður ein spíra til fremmandahatur í Føroyum, sigur John Johannessen, tinglimur Javnaðarfloksins**

ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*– Málið er ongantíð viðgjørt í samgonguni, og í staðin fyri, at vit í felag settu okkum niður og tóku stóra og týdningarmikla málið frá grundini, hevur landsstýrismaðurin tikið eina drastiska avgerð einsamallur, sigur ein misnøgdur John Johannesen í Javnaðarflokkinum*

Eftir fyrispurning frá Bill Justinussen úr Miðflokkinum var kjak í tinginum mikudagin um nógv umstrídda útlendingamálið, sum fær so ógvusligar avleiðingar fyri føroyskan ítrótt.

Ein av røðarunum í tinginum var John Johannessen úr Javnaðarflokkinum, og hann er ikki í iva um, at hvørki samgonga ella andstøða taka undir við ætlanunum hjá landsstýrismanninum í innlendismálum.

### Sjálvt Fólkaflokkurin ímóti

John Johannessen sigur, at ein stórur meiriluti í tinginum er samdur um at vera ósamdur við Jógvan við Keldu.

– Umframt andstøðuna, sum jú hevur til uppgávu at vera ímóti, vóru bæði javnaðar-, sambands- og fólkaflokstinglimir, sum av tingsins røðarapalli funnust at Jógvan við Keldu og hansara tilmæli, sum nú er í danska útlendingamálaráðnum, sigur ein avgjørdur John Johannessen.

Ungi tingmaðurin nevnir sum dømi floksfelagarnar hjá Jógvan við Keldu Poul Michelsen, Jákup Mikkelsen og Jørgen Niclassen, sum allir á ein ella annan hátt ikki mettu núverandi støðu vera nøktandi.

– Annika Olsen var helst einasti røðarin, sum tók undir við landsstýrismanninum í innlendismálum, og annars vóru so at siga øll ímóti tilmæli hansara, slær fyrrverandi tíðindamaðurin í Javnaðarflokkinum fast.

### Vandi fyri rasismu

John Johannessen ber ótta fyri, at áhaldandi útmeldingarnar hjá innlendismálaráðharranum um útlendingar kann seta ein spíra til fremmandahatur í Føroyum.

– Tá ein landsstýrismaður ferð eftir ferð úttalar seg á slíkan hátt, sum Jógvan við Keldur hevur gjørt, kann hetta elva til økta rasismu í Føroyum, og tískil mugu vit tala at, heldur John Johannessen.

Hann undirstrikar, at hann á ongan hátt leggur landsstýrismannin undir at vera rasist, men vil tinglimur Javnaðarfloksins heldur vísa á møguligar vandar, sum kunnu standast av slíkum kjaki.

### Jógvan koyrir solo

John Johannessen heldur, at tað ikki kann vera rætt, at ein landsstýrismaður uttan undirtøku nakrastaðni skal avgerða føroyskan útlendingapolitikk.

– Málið er ongantíð viðgjørt í samgonguni, og í staðin fyri, at vit í felag settu okkum niður og tóku stóra og týdningarmikla málið frá grundini, hevur landsstýrismaðurin tikið eina drastiska avgerð einsamallur, sigur ein misnøgdur John Johannessen.

Niðanfyri mælir Poul Michelsen til eina grein 25 nevnd, sum skal orða nýggjan føroyskan útlendingapolitikk, og hesum tekur John undir við.

– Eg taki undir við Poul Michelsen, sum mælir til at seta eina serstaka tingnevnd at orða ein breiðan útlendingapolitikk til føroysk viðurskifti, og áðrenn hetta er gjørt, kann Jógvan við Keldu ikki taka nakra avgerð einsamallur, sigur John Johannessen.

Nýklakti tingmaðurin úr Javnaðarflokkinum heldur, at tað eru meiri átroðkandi mál í Innlendismálaráðnum enn at forða útlendskum ítróttarfólki at koma til Føroya og menna føroyskan ítrótt.

Poul Michelsen:

# Jógvan við Keldu ov bráður

**Tingmaður Fólkafloksins, Poul Michelsen, mælir til at seta eina grein 25 tingnevnd, sum skal viðgerða allan útlendingapolitikkin frá grundini, áðrenn nøkur avgerð verður tikin av innlendismálaráðharranum Jógvani við Keldu**

ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*– Semja tykist vera í samgonguni um, at avgerðin um útlendingar í øllum førum eigur at bíða, til málið er viðgjørt frá grundini, heldur Poul Michelsen, tinglimur Fólkafloksins*

– Í løtuni situr ein tingmanning og viðgerð eitt mál, sum eingin hevur innlit í, og tískil mugu vit fara eftir rótini í málinum, sigur ein avgjørdur Poul Michelsen, sum mikudagin tók orðið undir orðaskiftinum í tinginum um nógv umtalaðu útlendingarnar.

Poul Michelsen heldur, at avgerðin hjá Jógvani við Keldu um, at ítróttarfeløgini skulu gjalda 60% av lønini til útlendsk ítróttafólk, er tikin ov skundisliga.

– Semja tykist eisini vera í samgonguni um, at avgerðin um útlendingar í øllum førum eigur at bíða, til málið er viðgjørt frá grundini, heldur Poul Michelsen.

### Grein 25 nevnd

Uppskotið hjá tingliminum í Fólkaflokkinum er, at ein serstøk grein 25 nevnd við umboðum úr øllum flokkum burturav skuldi verðið sett at orða ein breiðan, føroyskan útlendingapolitikk, sum í løtuni hongur í leysum lofti.

– So kundi semja verið fingin um sjálvan yvirornaða útlendingapolitikkin, áðrenn viðgerðin av einum serstøkum og avmarkaðum máli fór í gongd, sum málið um útlendsk ítróttafólk er, heldur Poul Michelsen.

Tingmaðurin úr Fólkaflokkinum heldur, at hetta skuldi verðið gjørt fyri langari tíð síðani, tí so hevði sloppist undan hesum háfloykta kjakinum um útlendsku ítróttafólkini, sum nú skulu hava minst 60% av lønini frá feløgunum.

– Eg veit satt at siga ikki, hvaðani Jógvan við Keldu hevur hatta talið, og júst hendan vantandi vitanini og innlitið er eitt høvuðseyðkenni í øllum kjakinum, sigur Poul Michelsen, sum tí mælir til eitt bakka og taka málið frá grundini, áðrenn nøkur avgerð verður tikin.

### Snýr seg ikki bert um ítrótt

Poul Michelsen heldur, at málið um útlendingar á snæðurskygdan hátt bert er vent ímóti ítróttarfólkunum og ítróttini.

– Tað er rætt, at avgerð landsstýrismansins í stóran mun ávirkar ítróttin, men eg hugsi eins nógv um teir 650 útlendingarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum ikki íðka ítrótt, sigur Poul Michelsen.

Hann leggur dent á, at vit hava við menniskju og mannalagnur at gera, og tískil skal málið við virðing og varðsemi viðgerast á borðbaran hátt, sum talan ikki hevur verið um enn.

– Higartil er ein yvirlýsing kroyst yvir øll, uttan at nøkur viðgerð og nøkur semja er funnin, eins og hon á mótsættan hátt varð í undanfarnu samgongu, tá fleiri útlendingar vórðu tiknir inn í landið vegna vantandi arbeiðsmegi, heldur Poul Michelsen.

Hann skjýtur sostatt upp at seta ein tingnevnd við umboðum úr øllum flokkum, sum frá grundini skal geva tinginum innlit í málið, og ikki fyrrenn tá kann nøkur avgerð takast á økinum.

– Eg trúgvi uppá eina semju millum flokkarnar um nýggjan, føroyskan útlendingapolitikk, sum í veruleikanum skuldi verið føroyskt málsøkið, og tá kann Jógvan við Keldu í samráð við onnur meta um, hvat er best at gera, heldur Poul Michelsen at enda.



Jógvan við Keldu:

# Eg standi við mítt

**Í kjalarvørrinum av orðaskiftinum í tinginum í gjár um útlendingamálið sigur landsstýrismaðurin Jógvan við Keldu, at hann hevur eina greiða støðu, sum hann stendur við, og tað er at bera seg at sambært lógini**

ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*– Eg havi eina danska lóg, sum eg havi skyldu til at umsita á rættan og lógligan hátt, og tískil fái eg ikki gjørt øðrvísi, sigur innlendismálaráðharrin Jógvan við Keldu*

– Eg havi eina danska lóg, sum eg havi skyldu til at umsita á rættan og lógligan hátt, og tískil fái eg ikki gjørt øðrvísi, sigur innlendismálaráðharrin Jógvan við Keldu um umstrídda útlendingamálið. Landsstýrismaðurin er keddur av, at støði gjørdist so lágt undir kjakinum í tinginum í gjár.

– At eg verðið ákærdur fyri at birta uppundir fremmandahatur, eri eg sera harmur um, tí tað einasta, eg havi gjørt, er at bera meg at sambært donsku lógini, slær Jógvan við Keldu fast.

### Eingin grein 25 nevnd

Fleiri tinglimir vístu í gjár sína ónøgd um, at eingin verulig viðgerð er farin fram í samgonguni, og at ein grein 25 nevnd skuldi verðið sett.

– Eingin nýggj nevnd verður sett orsakað av tí, sum er farið fram seinastu dagarnar, og tað ætli eg mær ikki at gera nakað við í fyrstu syftu, sigur ein avgjørdur landsstýrismaður.

John Johannesen og Poul Michelsen siga báðir í blaðnum í dag, at teir ikki mettu Jógvan við Keldu hava undirtøku í samgonguni, men har er landsstýrismaðurin ósamdur.

– Føroya Landsstýri hevur boðað frá, at undirtøka er fyri uppskotinum, og tískil eri eg ikki samdur við hesum, sigur Jógvan við Keldu. Hann heldur, at tá løgmaður sum ovasti myndugleikin greitt hevur gjørt vart við hetta, er einki at kjakast um.

### Kann ikki ignorera arbeiðsloysi

Jógvan við Keldu sigur, at hann sum landsstýrismaður ikki kann ignorera vaksandi arbeiðsloysi, sum seinastu mánaðirnar nærmast er tvífaldað.

– Tá lógin sigur, at útlendingar bert kunnu fáa arbeiði orsakað av »væsentlige beskæftigelsesmæssige hensyn«, má eg bera meg at eftir tí, og tá útlendingar fyrr eru komnir til landið, hevur tað verið orsakað av, at brúk hevur verið fyri arbeiðsmegi, men nú sær øðrvísi út, slær innlendismálaráðharrin fast.

Jógvan við Keldu sigur, at hann aftur skal hava fund við landsstýrið um málið í næstum, men fyribilst stendur hann við sítt og fer ikki at gera kompromis í málinum.

– Nú fáa vit at síggja, hvat landsstýrið sigur, men fyribils er eingin broyting frá mínari síðu um málið, sum eftir røttum skuldi verið føroysk málsøkið, sigur umstríddi landsstýrismaðurin at enda.

# Samanleggingar og slit millum kommunur

**Í hesum valskeiðnum hava fleiri fólkaatkvøður verið um kommunusamanleggingar, og í flestu førum hava borgararnir tikið undir við at leggja saman við eini størri kommunu – ella í eina størri kommunu. Tað er kanska undrunarvert, at hesar samanleggingar hava gingið so stillisliga fyri seg, tí søgan veit eisini at siga okkum um slit millum kommunur**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Higartil hevur tað gingið friðarliga fyri seg at leggja kommunur saman, men fyri stívliga fimti árum síðan slitnaði millum Skála og Strendur, og fyri 37 árum síðan slitnaði millum Runavíkina og Toftir/Nes*

Í Sundalagnum avgjørdu fleiri kommunur at leggja saman, og í Eysturoy hava ikki færri enn tríggjar kommunur avgjørt at leggja saman við Runavíkar kommunu.

Í Nólsoy hava tey eisini samtykt at leggja saman við Tórshavnar kommunu, eins og Bøur og Gásadalur hava samtykt at leggja saman við Sørvágs kommunu.

### Kommunuslit

Felags fyri flestu fólkaatkvøðurnar, sum verið hava, er, at ein meiriluti av borgarunum hava tikið undir við samanlegging. Í Hósvík skuldu tó tvær fólkaatkvøður til, áðrenn ein meiriluti av fólkinum tók undir við at fara upp í Sunda kommunu.

Men fara vit nakað nógv ár aftur í tíðina, slitnaði millum kommunur – ja, enntá millum rímiliga stórar kommunur, og hetta gekk sanniliga ikki so friðarliga fyri seg.

Vit skulu ikki ríva uppaftur í tí, sum tá fór fram, men minna á, at fyri 37 árum síðan slitnaði millum Runavíkina og Toftir/Nes, og fyri stívliga fimti árum síðan slitnaði eisini millum Skála og Strendur.

Aldurnar gingu rættiliga høgar, bæði eystarumegin og vestarumegin á Skálafjørðinum, tá ið hesi slit fóru fram.

Slitið millum Runavíkina og Toftir/Nes hevur mangan verið drigið fram, tí rættilig orrusta var um hetta mundið.

Eivind Jacobsen, bygdaráðsformaður í Sjóvar kommunu, sigur, at sambært gerðarbókunum var eisini rættilig togan í bygdaráðnum har yviri, tá ið kommunurnar slitnaðu sundur.

– Men eg haldi ikki, at orrustan millum fólkið var so stór hesumegin fjørðin sum hinumegin. Hinvegin gekk tað rættiliga lívliga fyri seg millum bygdaráðslimirnar hesumegin fjørðin, sigur hann og vísir til gerðarbókina.

### Undrunarvert

Tað er kanska undrunarvert, at hesar fólkaatkvøður hava gingið so stillisliga fyri seg, sum talan er um, tí hóast bygdirnar og bygdanøvnini vera verandi tey somu, verða kommurnar avtiknar.

– Oyndarfjørður verður altíð Oyndarfjørður, segði Árni Joensen, bygdarráðsformaður í Oyndarfirði undan fólkaatkvøðuni har norðuri.

Og rætt er tað. Somu orðini endurtók bygdarráðsformaðurin í Nólsoy, Jógvan Thomsen, tá ið ein stórur meiriluti av nólsoyingum avgjørdu at leggja saman við Tórshavnar kommunu.

Spurningurin er so, hvussu friðarligar samanleggingarnar verða, um spádómurin hjá Eivindi Jacobsen, bygdaráðsformanni í Sjóvar kommunu, gongur út.

Hann væntar nevniliga, at landsstýrið við lóg fer at leggja kommunurnar við Skálafjørðin saman, innan fýra ár eru umliðin.

– Og kanska verður tá øll Eysturoyggin ein kommuna, sigur Eivind Jacobsen.